## Stórt hall á Strondum

Bygdaráðið í Sjóvar kommunu hevur samtykt fíggjarætlanina fyri næsta ár. Skattaprosentið verður 21,5 og barnafrádrátturin 4.500 krónur. Bygdaráðið væntar at fáa 24,4 mió. krónur í inntøkum í 2008, og útreiðslurnar eru mettar til 40,3 mió. krónur. Hallið verður 18 mió. krónur. Bygdaráðið hevur eisini samtykt at útbyggja skúlan, og fyrsta byggistig, sum millum annað umfatar seks nýggjar skúlastovur, er mett at kosta 12 mió. krónur.



## Nuuk nýggjan borgarstjóra

Leygardagin valdi býráðið í Nuuk Nikolaj Heinrich til nýggjan borgarstjóra eftir Agnethe Davidsen, sum doyði í síðstu viku. Nikolaj Heinrich er úr flokkinum Siumut. Tvey onnur uppskot vóru. Tá atkvøtt varð, fekk Nikolaj Heinrich tær átta atkvøðurnar hjá Siumut og atkvøðuna frá Atassut, meðan Per Berthelsen hjá Demokratunum fekk fimm atkvøður. Teir fýra býráðslimirnir hjá IA atkvøddu ikki, og tískil var tað minnilutin, sum valdi borgarstjóran.

# Farligt fýrverk sett skamt frá spreingievni

**Tórshavnar kommuna troðkar umstrítt fýrverk inn á eitt øki, har ein goymsla við spreingievni longu stendur. Kommunan heldur dánt um lóggávu, reglugerðir og verandi virksemi á Bøllureyni, og noyðir privata fyritøku at bróta lógina, staðfestir Arbeiðseftirlitið.**

UMSITING
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*



*Bingjurnar á Bøllureyni við fýrverki standa ber 34 metrar frá gomsluni við spreingievni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tær hava staðið við ein goymslubygning á Hálsi. Og tær hava staðið í grótbrotinum Undir Varða. Vit tosa um eftirhondini umstríddu bingjurnar við fýrverki, sum smápartafelagið Skot eigur, og sum hava verið nógv frammi í fjølmiðlunum í seinastuni.

Líka síðani vandamiklu bingjurnar vunnu vegin fram til fjølmiðlarnar hevur Tórshavnar Kommuna víst seg frá síni aktivu síðu. Fyrst staðfesti kommunan, at fýrverkið kundi ikki standa á Hálsi og fekk tað flutt niðan í grótbrotið Undir Varða. Men tá onkur, og tað var also hvørki Arbeiðseftirlitið el-la Brunaumsjónin, síðani setti spurnartekin við, um fýrverkið stóð nóg væl og trygt inni í tunnlinum, handlaði kommunan aftur.

Næstsíðsta fríggjadag fekk smápartafelagið Skot at vita, at fýrverkið skuldi burtur úr grótbrotinum. Tað skuldi flytast niðan á Bøllureyn í seinasta lagi mánadagin eftir, ljóðaðu boðini frá Tórshavnar Kommunu. Seinni staðfestir ein av eigarunum í smápartafelagnum Skot:

- Nú er tað farið niðan á Bøllureyn. Vit vóru lidnir at flyta tað seint mánakvøldi, segði Rói Poulsen við Dimmalætting týsdagin í síðstu viku.

### Fýrverk og dynamitt

Á Arbeiðseftirlitinum situr Sigmar Hansen og blaðar gjøgnum dagsins bløð. Hann lesur greinina um bingjurnar við fýrverki og steðgar eina løtu við myndina hjá Kalmari. Sigmar Hansen umsitur lógina um spreinging og kennir beinanvegin aftur goymslubygningin aftast á myndini við bingjunum.

Hann veit, at í goymslubygninginum kunnu vera upp til 30 tons av spreingievni, av dynamitti. Myndin vísir, at bingjurnar standa sera tætt upp at goymslubygninginum, og Sigmar Hansen ger av at koyra niðan og kanna málið. Hann umsitir jú lógina um spreinging og harvið loyvið, sum partafelagið Borg hevur at goyma spreingievni í goymsluni, ið fyrst C.C. Hansen og síðani P/F Klement Petersen í mong ár hava havt á Bøllureyni. Bingjurnar við fýrverki standa 34 metrar frá goymsluni við spreingievni, staðfestir hann løtu seinni.

Lógin og kunngerðin um fýrverk er frá 1969, og verður umsitin av fútanum, og í ávísan mun eisini av Brunaumsjónini. Lógarverkið hevur lítlar og ongar ásetingar um, hvussu fýrverk kann og skal goymast. Í kunngerðini stendur m.a. einanas, at loyvi til størri nøgdir á goymslu kann fáast hjá landfútanum.

Men myndin sær øðrvísi út, tá talan er um spreingievni. Her eru greiðar reglugerðir um, hvussu spreingievni skal goymast, eisini hvat viðvíkur frástøðuni til aðrar goymslur. Her sigur lógin m.a., at er talan um eina goymslu, har loyvt er at goyma upp til 30 tons av spreingievni, skal frástøðan til nærmastu goymslu vera í minsta lagi 190 metrar.

- Við at máta frástøðuna kundi eg jú staðfesta, at nú var brádliga ein onnur goymsla, bara 34 metrar frá goymsluni við spreingievni. Tað merkir, at goymslan hjá P/F Borg brádliga ikki lýkur treytirnar í lógini um spreinging, og tí má hon niðurleggjast og tømast, sigur Sigmar Hansen.

Sum eftirlitismaður hjá Arbeiðseftirlitinum hevur hann onga heimild at gera nakað við bingjurnar við fýrverki – tær eru jú undir aðrari lóggávu og myndugleika.

Staðfestingin hjá eftirlitismanninum hjá Arbeiðseftirlitinum elvir til høvuðbrýggj hjá stjóranum í P/F Borg, Rodmund Nielsen. Hansara fyritøka hevur eitt góðkent loyvi til at goyma upp til 30 tons av spreingievni í goymslubygninginum á Bøllureyni. Loyvið er endurnýggjað á hvørjum ári, og avrit av loyvinum er sent til myndugleikarnar, bæði til fútan og til Tórshavnar Kommunu. Nú hevur Tórshavnar Kommuna givið boð um at flyta nakrar bingjur við fýrverki, sum fjølmiðlarnar hava sett fokus á, kloss upp at hansara goymslu. Avleiðingin av hesum er, at góðkenda goymslan brádliga er ólóglig.

- Jú, har var ein trupulleiki. Men hann er so loystur nú, svarar Rodmund Nielsen. Undir stutta svarinum hjá stjóranum tykist dvølja ein ótti um, hvørt fjølmiðlaumrøða av gomlu spreingigoymsluni skal seta hansara fyritøku í ringt ljós.

Loysnina venda vit aftur til um eina løtu.

### Kravboð

Fáar dagar frammundan, tann 23. november, hevur Rói Poulsen, ein av eigarunum í smápartafelagnum Skot, sum eigur bingjurnar við fýrverki, fingið bræv frá politinum. Kommunan samskiftir nevniliga einans við politiið, og ikki beinleiðis við sp/f Skot. Í brævinum til politiið skrivar Tórshavnar Kommuna millum annað soleiðis:

"Fýrverkið skal vera burtur úr tunnlinum á middegi mánadagin 26. november 2007. Er fýrverkið ikki flutt burtur úr salttunnlinum tá, fer kommunan at senda innihaldið í bingjunum til destrueringar fyri rokning hjá løgregluni."

Í brævinum vísir kommunan á eina fyribilsloysn: "økið á Bøllureyni við verandi dynamittgoymslu, sum eitt øki, ið verður nýt til líknandi endamál – nevniliga dynamitgoymslu."

- Tað gjørdu vit so, og fluttu bingjurnar niðan á økið á Bøllureyni, við verandi dynamittgoymslu, sum kommunan sjálv skrivar. Vit settu bingjurnar á einasta slættan, sum er á økinum, sigur Rói Poulsen.

Hansara fyritøka, sp/f Skot, hevur fingið skrivligt fyribilsloyv at hava bingjurnar standandi á Bøllureyni, til 7. januar 2008.

- Eg haldi tað vera ófatiligt. Tað tykist sum um kommunan ikki er áhugað í, at vit hava okkara virksemi í kommununi, sigur Rói Poulsen, sum ikki merkti nakrar trupulleikar, áðrenn bingjurnar við fýrverki endaðu í fjølmiðlunum.

Smápartafelagið Skot kannar nú møguleikarnar fyri at flyta sítt virksemi í aðra kommunu, tá fyribilsloyvi gongur út í januar mánaða næsta ár.

### Loysnin

Trupulleikin bleiv sum nevnt loystur. Men frammanundan elvdi hann til høvuðbrýggj og nógv virksemi.

Eftir at hava tosað við Arbeiðseftirlitið ringir Rodmund Nielsen, stjóri í P/F Borg, til Róa Poulsen. Hansara fyritøka stendir jú til at missa sítt loyvi, eftir at bingjurnar hjá sp/f Skot eru komnar ov tætt uppá.

Loysnin bleiv, tá avtornaði, at P/F Borg rindaði fyri at fáa flutt bingjurnar. Tað var eftir at Arbeiðseftirlitið hevði verið uppi og mált av, og funnið ein slætta, sum er í minsta lagi 190 metrar frá goymsluni við spreingievni.

Samstundis sum lastbilar fríggjadagin vóru á veg at flyta bingjur var drúgt samskifti millum Tórshavnar Komunu og politiið. Frá at kommunan í fyrstu atløgu sjálv vísir til økið á Bøllureyni, sær kommunan nú trupulleikan. Tekniski stjórin hjá Tórshavnar Kommunu, Jákup Egholm Hansen, skrivar nú soleiðis til politiið:

"Sum nú er, eru bingjurnar til stóran ampa fyri lógligu leigararnar av dynamittgoymsluni á Bøllureyni, og hevur kommunan frá eigaranum av dynamittinum fingið at vita, at Arbeiðseftirlitið møguliga vil taka teirra loyvi til goymslu av dynamitti har aftur sum fylgja av at fýrverkið stendur alt ov nær við." Kommunan bindir nú um heilan fingur og heitir tí á politiið, Arbeiðseftirlitið, Brunaumsjónina, Búnaðarstovuna og festaran um at fáa greiðu viðurskiftini og at áleggja eigaranum av fýrverkinum at fáa síni viðurskifti í rættlag.

Sosialurin fylgir við málinum.